# Jógvan Norði fyrsta túrin í hesi vikuni



Eftir tvey ár hevur tað eydnast brøðrunum, Hákuni og Jógvani Jacobsen, at finna eitt nýtt skip fyri Jógvan Norði, sum sakk vestanfyri í oktober mánaði 2003

Mynd: Eyðun Jacobsen

**Síðan brøðurnir, Hákun og Jógvan Jacobsen, keyptu grønlendska línubátin, Isak L, hevur hann ligið í Runavík, har ymiskar umvælingar og broytingar eru framdar umborð. Í vikuni verður klárt at loysa**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin var móttøka á Toftum í samband við, at nýggja línuskipið, Jógvan Norði, sum brøðurnir, Hákun og Jógvan Jacobsen hava keypt úr Grønlandi, kom á Toftir eftir, at skipið seinastu vikurnar hevur ligið í Runavík, har maskinverkstaðurin, Mekanik, hevur framt ymiskar broytingar umborð.

### Størri og rúmligari

Nógv fólk var samankomið til móttøkuna og hátíðarløtuna, har borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen, heilsaði skipi og manning og ynskti góða eydnu.

Hornatónleikur og sangur settu eisini sín dám á løtuna.

Eftir sjálva móttøkuna, har umboð fyri eigararnar eisini høvdu orðið, varð boðið umborð at síggja skipið, sum er bæði rúmligari og størri at síggja til enn gamla skipið, sum sakk undan manningini fyri stívliga tveimum árum síðan, tá ið teir vóru til fiskiskap einar 10 fjórðingar í ein útnyrðing úr Føroyum.



*Eftir hátíðarligu móttøkuna á Toftum leygardagin, bjóðaðu eigararnir fólki umborð at síggja skipið, sum er keypt úr Grønlandi*

Mynd: Eyðun Jacobsen

Nýggja skipið, sum er keypt úr Grønlandi og áður hevði navnið, Isak L, lá saman við einum øðrum grønlendskum skipi á Vestmanna, áðrenn Hákun og Jógvan keyptu tað. Grønlendingar hildu, at møguleikarnir fyri at selja skipini vóru størri, um tey lógu í Føroyum.

### Avstað í vikuni

Í Grønlandi hevur Isak L verið á línu-og garnaveiði, men nú er garnaútgerðin riggað av, og línuspæl, stokkar og splittarar til egningarmaskinuna eru sett upp í staðin.

Aðrar broytingar eru eisini framdar umborð, nú skipið at kalla er klárt at loysa.

Manningin, sum verður við Jógvani Norði, verður at kalla hin sama, sum var við gamla skipinum, og í gjár og í dag var ætlanin at rigga til og gera klárt at loysa.

Gongst sum ætlað, loysir nýggi línubáturin í dag ella í morgin.

Umborð verða 14 mans, og skipari verður annar av eigarunum, Hákun Jacobsen, meðan bróðurin og hin eigarin, Jógvan Jacobsen, verður maskinmaður.

Tað var pápi Hákun og Jógvan, Mathias Jacobsen, sum í sínari tíð bygdi Jógvan Norði fyri meira enn 40 árum síðan.

# Tá Jógvan Norði sakk vestanfyri

**Línubáturin, Jógvan Norði, var staddur einar 10 fjórðingar í ein útnyrðing úr Mykinesi, tá skipið í oktober mánaða fyri tveimum árum síðan fór at leka og sakk undan 14 monnum**

SØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir høvdu havt fimm setur og ætlaðu at gera eina setu aftrat, tá ið maskinmaðurin umborð línubátinum, Jógvani Norði, varnaðist, at sjógvur lak inn í maskinrúmið.

Línuskipið, Klakkur, var nærmasta skip; hann var einar sjey fjórðingar burturi.

Skipari á Jógvani Norði hendan feigdartúrin var Karl Martin Joensen, og hann greiddi soleiðis frá hendingini fyri tveimum árum síðan.

- Fyrstu løtuna sá kanska út til, at vit kundu halda skipinum lens, um vit fingu pumpur umborð, men skjótt sást, har var einki at gera. Sjógvurin fossaði inn, og tað var bert ein lítil løta, so var dúrkið í maskinrúminum undir. Løtu seinni stóð sjógvurin uppá hálvan motorin.

Manningin fór av skipinum umleið ein hálvan tíma eftir, at teir varnaðust lekan. Hann var landnyrðingur í ættini, og slætt var í sjónum. Allir 14 menninir, sum við vóru, fóru í yvirlivilsisdraktir.

Í bølamyrkri noyddist manningin á Jógvani Norði niður í bjargingarbátin, men teir vistu, at Klakkur nærkaðist, og skjótt gekst hjá teimum at finna bjargingarbátin, tá ið teir komu á staðið.

- Tað var ein undarlig sjón at síggja skipið, tú hevur verið við í fleiri ár, søkka. Jógvan Norði stóð beint uppeftir enda við gronini upp úr sjónum í einar 20 minuttir, áðrenn skipið sakk, segði Karl Martin Joensen, skipari.



*Myndin er tikin á dekkinum á Brimli, sum tók bjargingarbátarnar upp. Brimil er júst komin til lands við manningini, og maðurin á myndini er skiparin hendan túrin, Karl Martin Joensen*

Mynd: Vilmund Jacobsen